# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Frá Blair til Brown

Dagurin í gjár var søguligur, tí henda dag varð Blair skiftur út við Brown. Stórabretland fekk nýggjan forsætisráðharra. Gordon Brown, sum hevur sitið við liðina á Tony Blair í mong mong ár sum fíggjarmálaráðharri, tók við hesum hægsta embætinum í Bretlandi, Um somu tíð varð kunngjørt, at Tony Blair skal vera friðarsemingsmaður í Miðeystri.

Tony Blair hevur sitið sum forsætisráðharri í samfull 10 ár. Hóast tað hevur verið avtalað og ligið í kortunum alla tíðina, at Brown ein dag skuldi avloysa Blair, so hevur Blair treyðugt viljað farið frá. Vit skulu heilt aftur til tíðina, tá Labour var í andstøðu og táverandi leiðarin í flokkinum, John Smith bráddliga doyði og nýggjur formaður skuldi veljast. Tá játtaði Brown at taka seg aftur í kappingini um at blíva formaður og lat vinmanninum Blair upp í hendi formanssessin. Men afturfyri lovaði Blair honum ein týðandi leiklut í stjórnini, tá Labour kom til valdið umframt at hann eisini lovaði honum forsætisráðharrasessin eftir, at Blair hevði røkt hann í ávíst tíðarskeið. Men Blair helt ikki orð og helt fram eftir næsta skeið eisini. Tað hevði við sær, at tað gjørdist rættiliga kalt millum teir báðar. Nú gjørdist so endin tann, at Blair tók stigið og fór frá.

Gordon Brown hevur sum fíggjarmálaráðharri megnað at skapa stóran og framhaldandi búskaparvøkstur í landinum. Stórar íløgur eru gjørdar í vælferðarsamfelagið, soleiðis at bæðpi heilsuverk og skúlaverk eru høgt raðfest. Hóast hann og Blair hava staðið lið um lið, so er stórur munur á teimum. Meðan Blair er tann meira opni og karismatiski politikarin er Brown meira tigandi og afturlatin. Hetta merkir tó ikki, at hann ikki veit, hvat hann vil. Tvørturímóti er hann sera avgjørdur og kontantur. Teir konservativu fáa ikki eitt bein til jørðina, tá hann leggur fram síni uppskot í parlamentinum. Hevur hann sett sær fyri at gera eitt, so víkir hann ikki frá tí.

Nettupp hetta at hann er so egin og avgjørdur og ikki lættur at samstarva og samskifta við kann gerast ein trupulleiki, men hann hevur so havt rúma tíð til at fyrireika seg til nýggja leiklutin sum forsætisráðharri. Hann nýtist at prógva, at við honum fer Bretland inn í eina broytingartíð, soleiðis at hann ikki bara verður eitt ekko frá Blair. Brown hevur sum er ein imagetrupulleika, ið hann er noyddur at gera nakað við skal hann vinna eitt komandi val.

Ikki bert Bretland men allur heimurin og her serstakliga Evropa bíða spent eftir at síggja, hvat Brown veruliga stendur fyri og megnar.

**Sosialurin**

## Burturvið at allur fiskiskapur á firðum og sundum skal støðgast



**KÁRI P. HØJGAARD**
løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin

Nú styttist tíðin, til Løgtingið aftur skal áseta reglur fyri fiskiskapin komandi fiskiár. Tilmæli koma frá ICES, Fiskirannsóknarstovuni og Fiskidaganevndini, og út frá vitanini og ráðgevingini ger landstýrismaðurin Bjørn Kalsø, ið hevur málsøki at umsita, sítt tilmæli til Løgtingið.

Niðurstøðan hjá ICES var daprari, enn hon hevur verið seinastu nógvu árini, men hon er málað døkkari herheima av okkara egnu serfrøðingum. Almenni landsbankastjórin sigur í ramasta álvara, at tað ikki hevði bilað, um vit fylgdu ráðunum frá ICES og støðgaðu øllum fiskiskapi í longri tíðarskeið, tí at tað hevði ikki havt so stóra ávirkan á búskapin, sum fólk kanska rokna við.

Ivaleyst eru tað nógv fólk her á landi ið veruliga trúgva, at samfelagið saktans kann rekast eins væl ella kanska betur, um vit ikki fiska eitt tíðarskeið.

Teinkja vit hendan tankan, kunnu vit leysliga meta um avleiðingarnar.

Føroyar eru eitt veiðisamfelag og nærum allur útflutningurin er fiskur og fiskaúrdráttir.

Hvussu nógv skip høvdu havt ráð at lagt stilt í eitt longri tíðarskeið, fyri síðan at kunna byrja aftur at fiska?

Hvussu nógvir fiskimenn við servitan og royndum høvdu verið eftir at mannað skipini, so vit fingu gagnnýtt fiskatilfeingi eftir trý ára støðg?

Hvussu nógv flakavirkir høvdu opnað aftur, og hvussu nógv arbeiðsfólk við serfrøði høvdu verið eftir í landinum til at virka fiskin?

Hvussu nógv fólk høvdu flutt av landinum?

Farmaskipini sigla til Føroyar við vøru og fara avstað, fermd við fiskavørum. Hvussu hevði verið við handilsjavnaðinum?

### Tilmæli frávinnuni

Álitið frá vinnuni sigur, at allur fiskiskapur skal støðga í tríggjar vikur eftir 20. apríl (í gítingartíðini)?

Ongin ivi er um, at skal eitt munagott átak gerast, er friðing í gýtingartíðini tað munabesta. Men er gýtingin hjá toski fyri stóran part ikki yvirstaðin 20. apríl?

**2**
Firðir og sund skulu steingjast fyri allari veiði, eisini sokallaðari frítíðarfiskiskapi í tvey ár.

Alt síðan landnám hevur borið til hjá vanliga føroyinginum at fara á flot, at fáa sær eitt kók ella nakrar fiskar upp á træið. Tað, fiskað verður á hendan hátt er "peanuts" og ger ongan mun í stórapotti. Hetta er eitt frælsi føroyingar hava havt og framhaldandi eiga at hava.

Ferðavinnan marknaðarførir tráðufiskiskap og fiskikappingar, eins og hemaraveiða við tráðu vundið upp á seg, eisini her er talan um smáar nøgdir. Ein minking í summarfiskiskapinum kundi fingist við, at útróðrarbátar í summarhálvuni í samstarvi og samskipað við ferðavinnuna í størri mun fingu ágóðan av, at gera stuttleika-fiskitúrar við ferðafólki.

Fiskivinnan er og verður høvuðsútflutningsvinna okkara í nógv ár framyvir. Her eigur at verða pláss fyri frítíðar, parttíðar og fullriknum fiskiskapi. Alt ov víðgongd stig elva til ónøgd og ótryggleika og gagnar hvørki fiskimonnum ella fiskastovnum.

## Til Johan Dahl og Hermann Oskarsson



**POUL MICHELSEN**

Eg havi persónliga ikki nakað at siga um tann leistin, sum løgtingið samtykti at selja Føroya Banka eftir.

Eg skal ikki vísa aftur, at uppskotið hjá Hermann Oskarsson, sum eg haldi kom eitt ár ov seint, vildi givið meira í landskassan. Hinvegin var ein breið politisk semja um leistin. Semjan, vardi øll politisk áhugamál. Hon gav so sanniliga rúm fyri, at einskiljingin kundi verið væleydnað og virka menningandi í einskiljings- og partabrævafatanini millum føroyingar.

Var álitið, sum tingið gav Fíggjargrunninum og nevnd bankans innfríað, so ivist eg ikki í, at sølan av Føroya Banka vildi verði ein sólskinssøga, og ein góð byrjan til framhaldandi einskiljingar.

Eg haldi meg hava fullan rætt til at finnast at handfaringini, uttan at hetta skal bólkast sum hyklarí.

Eg varði, sum ein av tingmonnunum, av einskiljingaravtaluna um Føroya Banka.

Eg skilji tí ikki rættuliga Johan Dahl og Hermann Oskarsson og partvíst Torbjørn Jacobsen øðrvísi enn, at teir eru nøgdir við tað sum fari er fram. Tað eri eg ikki – so er tað sagt – enn einaferð.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.